

# VØRAN SKAL ÚT ÓANSÆÐ VEÐUR

**ÚTKOYRING** Ein treyt fyri at kunna arbeiða sum bilførari á heilsøluni hjá Poul Michelsen er, at ein er morgunmaður. - Eg fari oftast upp klokkan 3:00 - altso um morgunin. Men skal ein náa út við allari vøruni til øll støðini, má tað bara vera so, sigur Niels Jacob Heinesen, ið er ein av fleiri bilførarum hjá PM. - Eg havi arbeitt her síðani í juni mánaði í fjør, og hetta dámar mær sera væl. Serliga tá ein hittir so fitt fólk sum Eivind í Oyndarfirði

Tekstur: Snorri Brend
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Millum teir sløku 300 bilarnar sum í miðal koyra eftir Oyndarfjarðarvegnum, er stóri og guli lastbilurin hjá PM Heilsøluni í Havn.

Tríggjar ferðir um vikuna leggur Niels Jacob leiðina úr Havn á hesa drúgvu farleiðina, fullsettur við mjólkaúrdráttum, frukt, kølivørum og øðrum heilsøluvørum. Aðrar dagar er hann í Sandoynni í somu ørindum.

- Uppgávan hjá mær júst í dag er stutt sagt at fáa alla hesa vøruna til Sundalagið, vestara armin á Skálafjørðinum og Oyndarfjørð, greiðir hann frá.

- Nú eru tey so smátt farin at fyrireika summarið á Gjáargarði við Gjógv, so har havi eg eisini verið í morgun. So tú skilir, at hetta er ein rímiliga long ruta sum skal koyrast, og tað í øllum veðri.

Millum teir mongu handlarnar sum hann vitjar er eisini handilin hjá Eivindi Petersen í Oyndarfirði, sum verður umrøddur í aðrari grein í blaðnum.

## Hálvgum fimm

Hóast rutan hjá Niels Jacobi inn í Eysturoynna er tann drúgvara, so skal hann eisini regluliga við vøru til Sandoynna tvær til tríggjar ferðir um vikuna.

- Ja, eg eri í Sandoynni teir dagarnar, sum eg ikki eri her í Eysturoynni - tað vil siga týsdag og hósdag, og annanhvønn leygardag. Tá fari eg við Teistanum klokkan hálvgum átta um morgunin og farið yvir um aftur tríggjar tímar seinni.

- Fyrimunurin við tí er, at tá behøvist eg ikki at fara upp fyrrenn klokkan hálvgum fimm, har eg annars má upp fyrri enn tað. Tað vil siga, at tá kann eg sova eitt sindur meiri enn ein tíma longur. Tað er tað reina luksus, sigur hann brosandi.

Uppí hesa rutuna hoyrir barnagarðurin og Heilbrigdið á Velbastað, Teistin sjálvur og aðrir kundar í Sandoynni.

Afturkomin til Havnar fer hann beinleiðis niðan til MBM eftir mjólk sum skal oman á lagrið, so at teir har kunnu byrja at pakka bilin sum skal til Suðuroyar.

## Langur dagur

Tað er við Niels Jacobi sum hjá so mongum øðrum, til dømis bakarum, at teir fara til arbeiðis árla á morgni og fáa tí tíðliga frí.

Hann plagar at royna at vera aftur á arbeiðsplássi sínum um middagsleitið, tá starvsfólkini fáa sær ein bita saman. Men tað er ikki altíð at hann røkkur tað.

- Tað kann henda, at eg skal eftir meiri mjólk, ella eg skal til Kollafjørð eftir frystigóðsi, ella onkur annar akuttur ordri er komin inn, ja, so blívur klokkan sjálvandi meiri enn tað.

- Tá kunnu dagarnir blíva langir, vísir hann á.

Eitt dømi um hetta var mánadagin í farnu viku, tá var báturin við fruktini og øllum bløðunum seinkaður, orsakað av veðri. Tá var ikki annað hjá Niels Jacobi og hinum at gera enn fyrst at leggja leiðina norðureftir aftur við einum parti av vørunum, og seinni um dagin á somu rutu við restini.

Henda dagin var hann ikki við hús fyrrenn klokkan gekk til seks. Tá vóru gingnir útivið 14 tímar, síðani hann fór til arbeiðis.

- Eg skal bara heilsa og siga, at tá var eg ótrúliga moyrur. Tá var gott at koma til hús.

## Vit koyra

Júst hetta við veðrinum hevur eisini eina avgerandi ávirkan á gerandisdag hansara sum bilførari hjá PM.

Ein vakran summardag gongur alt sum eitt spæl, men ein myrkan og kaldan vetrardag krevur tað munandi meiri at skula koyra millum bygdir við stórum lastbili.

- Um vit altíð fara avstað? Ja, sjálvandi gera vit tað. Er tað koyrandi og líkindini annars eru til tað, so fara vit út við okkara vøru, - eisini her til Oyndarfjarðar. Og sum tú sjálvur hevur roynt tað, so er tað OK í dag, men ein ringan vetrardag er tað ikki bara sum at siga tað.

- Í vetur hevur verið rættiliga hált og keðiligt veður, og tá kann rutan lættliga taka tríggjar ella fýra tímar longur. Tá er ikki altíð eins hugaligt, má eg siga, tá ein í kulda, myrkri og regni skal út til handlarnar við vørunum.

Tað kann tó ikki vika við tann veruleika, at hann trívist undir hesum umstøðum. Og hví skuldi hann ikki eisini tað - á síðuni á bili hansara stendur nettupp: Trívast í kulda!

*snorri@sosialurin.fo*